## Sak um Madeleine

Dómsvaldið í Portugal er farið undir at viðgera eitt rættarmál ímóti fyrrverandi løgregluyvirmanninum Goncado Amaral, sum hevur skrivað eina bók um málið, tá enska gentan Madeleine McCann hvarv í Portugal. Í bókini skrivar høvundurin, at Madeleine doyði, og at foreldrini beindu hana burtur. Foreldrini avsanna skuldsetingina, og tey hava kravt fleiri milliónir sterlingpund í endurgjaldi fyri ærumeiðing. Tey hava sagt, at endurgjaldið skal brúkast til at halda fram við leitingini eftir Madeleine, skrivar Reuters.



## Campbell í hoyring

Alastair Campbell, sum var ráðgevi hjá fyrrverandi bretska forsætisráðharranum Tony Blair, segði í einari hoyring í London í gjár, at eins og George W. Bush, forseti, vildi Blair hava Saddam Hussein úr forsetaembætinum í Irak. Hann legði tó afturat, at Blair ætlaði sær ikki at leypa á Irak í óðum verkum fyri at fáa Saddam av vegnum. Í hoyringini segði Campbell, at eftir hansara tykki eiga bretar bretar at vera stoltir av, at teir vóru við til fáa stjórnarskifti í Irak. Alastair Campbell var samskiftisráðgevi hjá Tony Blair frá 1994 til 2003 og hevði stóra ávirkan á frágreiðingina um tey iraksku hópoyðingarvápnini, sum vístu seg ikki at vera til.

# Gevast at selja ivasom merki



*Mánadagin avdúkaði Sosialurin, at fleiri skip í Føroyska flotanum hava bjargingarringar av merkjum, sum eru avdúkað, at kunna søkka. Í dag kunnu vit staðfesta, at ivasomu merkini higartil hava verið seld av størstu veitarunum av trygdarútgerð, men nú fara teir báði at gevast við hesum*

**Higartil hava fyritøkurnar, ið hava størsta partin av føroyska marknaðinum við bjargingarútgerð, selt øll trý sløgini av bjargingarringum, sum kunnu søkka. Men nú upplýsa stjórin á Gummibátatænastuni og stjórin á Fønix, at teir í framtíðini ikki fara at selja ivasomum merkini**

BJARGINGARRINGAR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Tað hevur verið gjørligt at keypa bjargingarringar av ivasomu merkjunum Eval, Perrybuoy og Altura – sum í Svøríki eru staðfestir at kunna søkka – frá fyritøkunum, sum selja mest bjargingarútgerð í Føroyum. Men soleiðis verður ikki í framtíðini.

Fønix hevur millum onnur selt merkini Perrybuoy úr Onglandi og Altura úr Italia, men sambært stjóranum fer hetta ikki at halda fram.

– Vit hava til samans tríggjar ringar eftir av hesum sløgunum, og eru í veruleikanum longu skiftir til merkið Lalizas, sum ongin feilur er funnin við, staðfestir Alfred Hummeland, stjóri og eigari á Fønix.

Støðan er tann sama hjá Gummibátatænastuni.

Teir hava selt nakrar ringar av merkinum Eval, men Dánjal Jóhan Thomsen, stjóri á Gummibátatænastuni sigur seg sjálvandi ikki vilja selja ringar við feilum.

– Vit selja nógv mest av ringunum, sum eita Viking, og tí fara vit at halda fram við, sigur stjórin á Gummibátatænastuni.

– Eg havi enn ikki fingið nakað brævum Perrybuoy, so vit fáa at síggja, hvussu teir gera, sigur Alfred Hummeland.

Hann leggur afturat, at hann er um at senda bræv út til allar sínar kundar, um hvussu teir kunnu fyrihalda seg við hendan trupulleikan, sum sær út til at vera.

Hjá gummibátatænastuni verða eisini tiltøk sett í verk.

– Vit hava bara selt 12 ringar av slagnum Eval, og nú fara vit at taka teir allar inn til kanningar, sigur Dánjal Jóhan Thomsen, sum er um at geva hesi boðini út til teir ymisku kundarnar.

### Ein einfaldur feilur

Báðir stjórarnir á fyritøkum, sum selja bjargingarútgerð, staðfesta, at tað ikki er nógv at halda um hetta mál.

– Tað er ikki óvanligt í øðrum vinnum, sum til dømis í matvøruvinnuni, at ávís mistøk henda framleiðsluni.

– Hetta er eftir øllum at døma ein einfaldur produktiónsfeilur, og tí er tað bara gott, at tað verður uppdagað, sigur Dánjal Jóhan Thomsen.

Alfred Hummeland á Fønix sigur, at tað er eitt øgiliga lítið tal av ringum, sum feilur er í, men at avleiðingar sjálvandi mugu takast.

### Taka ringar inn

Í gjár fekk Alfred Hummeland bræv frá Valeria San Giorgio í Italia, sum gera Altura ringarnar.

Í brævinum stendur, at fær fyritøkan defektar ringar aftur, sum serliga eru framleiddir í januar 2004, so verða teir endurgoldnir, tí fyritøkan vil ikki hava fleiri feilir at henda, og annars greiðir brævið frá, hvussu ringarnir skulu handfarast, so teir halda so væl sum gjørligt.

### Skift ringar út

Hóast tað ikki var fyrr enn mánadagin, at tað kom alment fram í Føroyum, at feilir eru í ávísum sløgum av bjargingarringum, so hava partar av skipavinnuni verið greiðir yvir ivasomu ringarnar í eina tíð og hava tikið avleiðingarnar av tí.

– Vit hava dømi um skip, sum longu hava skift allar ringarnar umborð út, sigur Alfred Hummeland.

### 400 krónur

Ein bjargingarringur kostar vanliga einar 400 krónur uttan meirvirðisgjald, so tað er ikki tann størsta íløgan at broyta bjargingarringar, sambært stjórunum á Fønix og á Gummibátatænastuni.

## Merkið eitur Eval

Í Sosialinum mánadagin stóð skrivað, at merkið úr Grikkalandi, sum Smyril hevur umborð er av merkinum Aval, men hetta er ikki heilt rætt, tí ein stavur er komin skeivt fyri í bjargingarringunum Eval úr Grikkalandi.

## Smyril sent ringar til kanningar

Bogi Mortensen, stjóri á Strandfaraskipum Landsins, staðfesti á Rás2 í gjár, at skriv er sent til avvarðandi myndugleikar, um at fáa greiðu á, hvussu støðan er við ringunum umborð á Smyrli, eftir at Sosialurin mánadagin avdúkaði, at ringarnir umborð eru av merkinum Eval, sum í Svøríki er funnið fram til at kunna søkka, tá teir skulu brúkast.

Málið hevur á Álandi millum annað havt við sær, at Viking Line hevur skift ein triðing av øllum sínum ringum til annað merki.

## Ivasomu merkini

Tað eru trý merki av bjargingarringum, sum tað í Svøríki er funnið fram til, at tað er møguleiki fyri at teir søkka, tí skúmið inni í ringunum tódnar.

**Merkini eru:**
Altura úr Italia.
Eval úr Grikkalandi.
Perrybuoy úr Onglandi.